Heini í Skorini:

# Gjørdist vinur við fu

**- Míni vinfólk í Miðeystri vóru bæði intelligent og kærleiksfull, men eisini djúpt fundamentalistisk. Og eg skilti tey væl. Var eg í teirra støðu, varð eg uttan iva líka víðgongdur, sigur Heini í Skorini, sum í seks mánaðir hevur eygleitt stríðið í Miðeystri frá fremstu røð**



*- Tá hatrið fær eitt andlit, og víðgongdir hermenn gerast tínir vinir, ført tú ikki longur kveistra tey burtur sum ørvitisknokkar, sigur Heini í Skorini, sum í seks mánaðir hevur ferðast runt í krígsherjaðu økjunum í Ísrael, Gaza og á Vestara Áarbakka*

*Mynd: mureldur*

SAMRØÐA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

25 ára gamli Heini í Skorini trummar eitt sindur rastleysur fingrarnar í borðið. Eini 10 minuttir eru farnir, síðani hann bílegði sær eina sandwich, og hann er við at ótolnast. Og tað er ikki bara tí, at hann er svangur.

Eftir seks mánaðir í einum av heimsins brennideplum í Ísrael, Vestara áarbakka og Gaza, hevur ungi havnarmaðurin eitt sindur ilt við at venja seg við avslappaða liviháttin í Føroyum.

- Ikki tí bumbuhóttanir eru nakað at leingjast eftir, men tá tær eru partur av gerandisdegnum, kann onki bíða til í morgin. Eitt tað fyrsta, eg legði til merkis í Miðeystri var, hvussu ófatiliga intenst fólk liva. Tey ganga upp í alt við lív og sál og arbeiða, ballast, kjakast, dansa og eru í gongd mest sum alt døgnið runt. Ofta hugsaði eg: Nær hundan sova tey?, sigur Heini í Skorini og roynir at fáa eyga á ein tænara.

- Tá man so situr aftur her í Føroyum, har alt gongur fyri seg í slow motion, fær man eina sníkjandi kenslu av, at lívið bara fer framvið. Hinvegin er hatta jú ein luksuskendur tanki, tí prísurin, tey gjalda fyri at liva her og nú, er jú hóttanin um, at teirra lív er sprongt í túsund pettir í morgin, sigur Heini í Skorini og hyggur hugsunarsamur fram fyri seg.

- Tað vísir bara, hvussu ótrúliga langt náðileys politisk stríð grípa inn í lívið hjá milliónum av heilt vanligum menniskjum. Hjá heilt ófatiliga nógvum í grundini. Og tað kann man ikki bara ignorera.

## Í fremstu røð

Heini í Skorini kann í hvussu er ikki. Tí fór hann einaferð í heyst undir at kanna møguleikarnar fyri at gerast starvslesandi á eini danskari sendistovu í Miðeystri sum lið í síni útbúgving. Frá sendistovunum í Beirut og Teheran var svarið, at tey ikki høvdu tikið móti starvslesandi síðani Muhammed-kreppuna, tá sendistovurnar har vórðu álopnar og onnur brend í grund. So var Ísrael eftir, og eftir eina starvssamrøðu umvegis Skype í oktober fekk Heini í Skorini játtandi svar frá politisku deildini á sendistovuni í Tel Aviv.

- Áhugin hjá Danmark í politisku gongdini í Miðeystri hevur neyvan nakrantíð verið størri. Tí var hetta ein ótrúligur møguleiki at sleppa at eygleiða eitt av heimsins mest fanatisku religiónskríggjum frá fremstu røð og vónandi kanska eisini skilja tað betur, sigur Heini í Skorini.

Um tað yvirhøvur ber til at skilja eitt slíkt stríð. Tí, sum Heini í Skorini vísir á, tykist tað ikki, sum nakar endi er á teimum ræðuleikum, sum áhaldandi hava herjað Miðeystur ígjøgnum søguna og gera tað enn í dag. Meðan tað er eydnast Europa og serliga Norðurlondum at etablera seg sum liberal fólkaræði, síggja vit, hvussu harðrend prestastýri, fundamentalisma, kvinnukúgan, yvirgangur, manglandi skrivi-, talu- og trúarfrælsi framvegis hvønn dag elva til endaleysa líðing og neyð hjá milliónum av menniskjum í Miðeystri.

- Síðani Ísrael varð stovnað í 1948, og serliga síðani Eysturjerusalem varð hertikið í 1967, er landið vorðið ein vígvøllur í stríðnum móti grannalondunum. Tað er eins og alt gamla Palestina er dømt til stríð, og mangan spyr man seg sjálvan, hvat ólukkan hevur gingið galið, sigur Heini í Skorini, sum skjótt fekk sjón fyri søgn.

## Tá grannin er svakur

Stutt eftir, at hann var byrjaður á sendistovuni, fekk friðartilgongdin enn eitt skot fyri bógvin, tá ein sjálvmorðsbumbumaður frá Hamas-rørsluni, ið ræður í Gaza, slóð til sunnast í Ísrael. Sjálvmorðsbumban, ið var tann fyrsta frá Hamas í fýra ár, gjørdist harvið byrjanin til enn eina røð av atsóknum, har Ísrael so svaraði aftur við ógvusligum luftálopum.

Og á sendistovuni í Tel Aviv sótu Heini í Skorini og hini og eygleiddu stríðið og rapporteraðu til danska Uttanríkismálaráðið, so hvørt, bumbur og rakettir geltu. Men, sum hann sigur – tíðindini, sum fóru til danska Uttanríkismálaráðið og restina av heiminum, vóru sum altíð sjálvsagt bara ein partur av myndini.

- Veruligi sorgarleikurin er, at hvør einasta bumba er eitt prógv um, hvussu dyggiliga hetta stríðið hevur forkvaklað hugsunarháttin hjá hesum menniskjunum, sum eftirhondini ikki duga at ímynda sær, at tað kann vera øðrvísi. Tí fyri hvørja einastu bumbu, sum brestir, brestir eisini enn ein vón hjá enn einum menniskja, til tað ikki longur hevur nakað at hava vónina í, sigur Heini í Skorini, sum kortini á ongan hátt góðtekur hetta sum eina rættvísgering av ella umbering fyri hatrið og harðskapin í Miðeystri.

- Nei, onki kann nakrantíð umbera harðskap, hvørki í Miðeystri ella nakra aðrastaðni. Men um grannin hjá tær er svakur, verður tú noyddur at fyrihalda teg til tað. Og ert tú so óheppin at búgva í einum øki, har grannin tveitir bumbur og rakettir eftir tær, snýr alt seg um at yvirliva, antin tú ert palestini ella ísraeli. Ert tú hartil sannførdur um, at fremsta missiónin hjá granna tínum er at útsletta teg og tíni, verður tað eitt endamál í sær sjálvum at skaða hann mest møguligt, áðrenn tú sjálvur gongur til grundar. So ræðandi einføld gerst myndin – í øllum førum, tá tú stendur mitt í harðast raktu økjunum.